Viðmerking:

Dirigentur: Martin Mouritsen

W.A. Mozart	Symfoni nr. 29 A-Dur KV 201 Allegro moderato Andante Menuetto Allegro con spirito
L.v. Beethoven	Romansa í F-Dur opus 50 fyri violin og orkestur. Solistur: Guðný Brynhild Næs
W.A. Mozart	Allegro maestoso úr floytukonsert í G-Dur KV 313. Solistur: Marjun Herup Olsen Steðgur
A. Vivaldi	Allegro úr violinkonsert í a-moll. Solistur: Jón Festirstein Andreasen
J. Haydn	Vivace úr konsert fyri klaver og orkestur. Solistur: Kristina Dalgarð
J. Haydn	Allegro assai (Rondo all' Ungherese) úr konsert fyri klaver og orkestur. Solistur: Andrea á Dul Mortensen.
H Bellstedt G. Brand/S. Foggin	Lagið Napoli við variatiónum fyri trompet og orkestur. Solistur: Johan Hentze

Hesir ungu solistar eru næmingar í musikkskúlaskipanini og eru valdir í kapping. Í skipanini eru annars 1070 næmingar og 25 lærarar harav nakrir eru við í Føroya Symfoniorkestri. Musikkskúlarnir samstarva við fólkaskúlar og tónleikafelagsskapir á staðnum. Í Havn og Klaksvík hýsast skúlarnir í egnum hølum. Árliga musikkskúlastevnan við fleiri enn 300 næmingum verður 5., 6. og 7. mai í Norðurlandahúsinum og tá verða konsertir við øðrum dugnaligum næmingum.

Ódemokratiskt — so tað stendur eftir!

Líka síðani fullveldis samgongan trein innar á politisku arenaina, hevur punkt 1 í samgonguskjalinum tóna út í hvørt horn á føroya landi. Tað eru gjørd álit, heimasíður, kunningarfundir og tíðindafundir eru hildnir, og kilometrar av greinum eru skrivaðar, afturat teimum tíðindastubbum sum sjónvarp og útvarp hava varpa út í hvønn krók og kanska enntá longur út í heim.

Demokrati

Í øllum sokallaðum framkomnum londum, hevur demokratiði verið ein av hornasteinumum undir samfelagnum. Tað at fólki hevur rætt til talu, trúgv osv. er ein sjálvfylgja vit ikki hugsa um dagliga. Men fyri at eitt nútímans demokrati veruliga kann virka, er vitanin hjá tí einstaka sera tíðandi. Tað hjálpur ikki at kunna velja, vissi tú ikki veist hvat tú kanst velja ímillum.

Kunning

Og her kemur kunning inn í myndina. Tað er gjógnum upplýsing at vit fáa vitan um nakað. T.d. via tað sum verður hoyrt og sæð. Alt sum vit vita er komið onkunnstaðnis frá. Nakað hava vit uppliva sjálvi, okkurt er sagt okkum beinleiðis av fólkamunni og so er tað eisini nógv vit hava hoyrt ella sæð í fjølmiðlunum. Ongantíð fyrr eru vit blivin ávirkaði so nógv gjøgnum fjølmiðlar sum í dag; og hettar rákið er neyvan av enn, nú interneti gongur sína sigursgongd

Keldurnar

Tá vit hava viðurkent at vitan er seta tíðandi fyri at dagligu valini kunna verða gjørd á einum røttum grundarlagi, og at kunning/upplýsing er grundarlagi undir vitanini, so er hóskandi at spyrja hvaðani kemur hendan upplýsing. Hvørjar eru keldurnar?

Politisk upplýsing

Á løgtingsins fíggjarlóg, standa á hvørjum ári nakrar milliónir til politiska upplýsing. Upphæddin verður luta politisku flokkunum til at kunna um teirra politisku sjónarmið. Ein kann yvast í um hesir pengar vera væl brúktir ella ikki, men um ein boðskapur skal koma ítøkiliga fram, so kunna vit nokk semjast um at pengar hálpa væl til, um teir vera nýttir við skili. Pengarnir blíva býttir eftir tingmannatali flokkana og tað er so nøkunlunda rættvíst.

Ódemokratiði

Eftir at hava hoyrt Høgna Hoydal snakka um at einki kann vera meira demokratiskt gjógnumført enn fullveldismálið, so má eg siga at eg eri ógvuliga ósamdur. Fullveldis-sannføringarhetsin er so gjøgnumført ódemokratisk, at tað stinkar. Ein ræðumynd um peningaveldi í politikki, er amerikanska forsetavali. Her er tað stuttsagt ógjørligt at koma uppá tal sum valevni uttan at hava nógvar milliónir í rygginum. Men eru støðan í Føroyum so nógv betur?

Slangan í kassanum

Samgonguflokkarnir fáa eins og andstøðuflokkarnir politiska upplýsing. Men hyggja vit eftir hvussu nógvir pengar í dag eru og vera brúktir til at marknaðarføra fullveldismálið (teirra flokkspolitisku sjónarmið), so er talan um milliónir, sum væl at merkja ikki vera bókaðar sum politisk upplýsing.
Hvussu kann umrøðan um ríkisrættarligu støðu okkara sigast at vera demokratisk, tá kunningin og miðlarnir til hettar eru so ójavnt býtt? Tað er gaman í at ferðast landið runt likamliga, á pappíri, gjøgnum luftina ella í cyperspace við fullveldis boðskapi, tá gildið verður goldið við slangu í landskassanum — uttanum politiska upplýsing.

Rættvísi

Skula vit snakka um rættvísi og demokratiska mannagongd, so er minstamarki at partarnir í umrøðuni hava somu møguleikar til at marknaðarføra seg og sín boðskap. Hettar er so langt frá veruleikin tá vit snakka um umrøðuna av ríkisrættarligu støðu okkara og teimun avgerðum í standa fyri framman.

So til samgonguna, um tit veruliga ynskja okkara ríkisrættarligu framtíð at vera avgjørda á einum sonnum demokratiskum grundarlagi, so kundi verið hóskandi at byrja við at givið andstøðuni, somu peningaligu fiskiloyvi á somu grunnum, sum tit so ríkiliga troyta!

Gunnar K. Nattestad

Framhald av síðu 21

føturnar á nýliberalistisku kreftunum. Óg serliga Føroya fólk eigur at hugsa seg væl um og eisini at gera vart við seg, um tað er eina slíka skipan, vit ynskja.

Skulu vit selja solidaritetin til frama fyri egoismuna hjá teimum fáu útvaldu? Tað er tað, sum málið snýr seg um.

Landsstýrið borðreiðir nú við einum vælstandi uttan vælferð. Og eg má siga tað, sum tað er, hetta líkist mest av øllum einari nýliberalistiskari kollvelting.

Taka vit Caragata-álitið, so skal føroyska samfelagsskipanin gjøgnum eina hugsjónarlig endurføðing.

Caragata er ikki eitt vísindarlig undirbygt álit ella frágreiðing, men talan er um eitt hugsjónarligt álit. Hvar finst ein vísindalig argumentatión ella prógvførsla fyri, at lægri skattir merkja búskaparligur vøkstur?

Fólkaflokkurin og New Zealand

Stóra fyrimyndin er nú Ísland umframt sjálvandi New Zealand, hiðani Caragata, sum nú gjørdist avloysarin hjá Milton Friedmann, kemur.

Í Dagblaðnum hevði stavnamaður Fólkaflokksins langa grein, har hann av øllum alvi royndi at verja samfelagsskipanina á New Zealandi. Óli Breckamann hevur jú sum kunnugt stóru fyrimyndirnar í Thatcher og Reagan og nú eisini Roger Douglas og øðrum ultrakonservativum, og tað er vist í lagi sum fólkaflokksmaður.

Politiski búskaparfrøðingurin Keith Rankin kallar Caragata Tax Report fyri „ A Nail in the Coffin of the Fiscal Contract".

Ein onnur grund fyri, at Caragata-frágreiðingin ikki er eitt vísindarligt skjal, er, at teir halda seg til ávísar loysnir og ávís modellir av hugsjónarligum orsøkum, meðan ein vísindarlig framløga neyvan hevði avskorið allar aðrar møguleikar sum óbrúkiligar. Caragata heldur seg sita inni við einasta sannleikanum, og frágreiðingin heldur seg til vøkur búskaparlig lyklatøl uttan at kaga eftir, hvørjar samfelagsligu avleiðingaqrnar verða.

Rætt er, at liberaliseringsátakið byrjaði undir Labour í 1984. Men tá fevndi Labour rættiliga breitt og var einasta alternativið til konservativu Muldoon-stjórnina. Sjálvt Roger Douglas, sum tá var fíggjarmálaráðharri, rúmtist í Labour. Í dag er hann komin í rætta flokk sín - tann høgravenda Act - flokkin. Tó skal sigast, at Labour-stjórnin, høast hon gjørdi nógvar ólukkur frá 1984 til 1990, ikki rørdi fakfelagsbygnaðin ella lønarlagið. Tað hava teir konservativu síðan tikið sær av.

Privatiseringin á New Zealandi førdu við sær, at

• telefyritøkan og jarnbreytirnar vórðu seldar til amerikanarar.
• skógbrúksvinnan varð seld til amerikanarar og japanesarar.
• bankarnir vórðu seldir til australiarar.
• tryggingin varð seld til bretar.
• flogfeløgini vórðu seld til australiarar.
• Frá januar til juli í ár fluttu 22.500 nýsælendingar til Australia fyri at leita sær arbeiði. Fólkatalið er um 3.6 mill. fólk, so um gongdin heldur fram, so svarar tað til uml. 1%.
• Uttanlandsskuldin hækkaði við 30%,mált av BTÚ, frá mars 1984 til mars 1995.
• Talið av húsarhaldum undir fátækramarkinum fór frá 4,3% til 10,8% frá mars 1984 til mars 1994.
• 17,8% av nýsælendingum livdu undir fátækramarkinum í 1991.
• fakfelagsrørslan er syndrað sundur
• alt samfelagið byggir á individualismuna.
• einasti almenni vøkstur in er løgreglan, dómstólarnir og fongsilsverkið

New Zealand hevur skarað framúr við at hava stóran vøkstur í ójavna seinastu árini. Fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð hava teir fingið ein **undirklassa**, tá umfatandi liberaliseringarnar vórðu framdar. Arbeiðsloysið vaks, samstundis sum almannaveitingarnar minkaðu, og harvið gjørdist ein stórur partur av fólkinum sera illa fyri. Gaman í, ein partur av fólkinum gjørdist nógv meira múgvandi av somu liberalisering.

Her er talan um at geva seg fult og heilt yvir til ótálmaðar marknaðarkreftirr, meðan vælferðin verður avmonterað. Vælstandur hjá nøkrum, men annars als eingin vælferð.

Og her má eg geva skilamanninum Lionel Jospin viðhald, tá hann sigur: „Ja til marknaðarkreftir, men nei til marknaðarsamfelagið."

Stingið fingurin í jørðina
Sjálvandi skal ein samgonga seta sær mál, og tað eiga at vera høg mál. Men nær tykir, at henda samgongan alla tíðina setur málini so høgt og so langt úti, at flest fólk frammanundan koma til, at hesi málini verða ikki nádd. Tey hava einki samband við veruleikan.

Vit høvdu ein sjálvstýrismeiriluta á tingi eftir kríggið, og tá var málið loysing. Úrslitið gjørdist heimastýrislógin. Vit høvdu eitt sjálvstýrislandsstýrið frá 1963 til 1967, og málini tá vóru eisini føgur og høg, men úrslitið rættiliga soltið. Tað er eins og søgan er við at endurtaka seg. Samgongumeirilutin setur sær slík mál, at málini sjálvi forða fyri, at tað skal bera til.

Men tað er kanska eisini endamálið. Hvør veit - livst so spyrst.

Ein góð byrjan hjá tykkum og okkum øllum var, at vit tóku útgangsstøðið í tí samfelag, sum vit búgva í og ikki í Hvítbókum og Caragata-frágreiðing. Vit kunnu ikki byrja heilt á berum og av nýggjum, hvørja ferð ein nýggj samgonga kemur til.

Vælsignaðir menn, stingið fingurin í jørðina.

Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður

Til minnis um
Camillu Heinesen

Hóast Camilla var sjúk leingi, so kom tað bráddliga at hon doyði. Fyrstu ferð eg var inni hjá Camillu og Dia var ienki ófrøt, hon var beinanvegin klár at geva okkum drekkamunn og góða heimabakaða kaku, men sjúkan, sum hon hevði, gjørdi at alt broyttist skjótt, í tí síðstu tíðini var ikki so lætt at fáa samband við Camillu, men høvdu vit genturnar við, so var alt annarleiðis, tá lívgaðist hon upp, man sá hvussu góð og glað hon var fyri sínar langommudøtur.

Har var altíð so hugnaligt at koma inn at vitja, og tað er tað eisini nú, sjálvt um tú Dia situr einsamallur har. Deiliga hugnaligt at fáa eitt gott prát, drekkamunn, kaku, og ikki at gloyma hvussu tú forstýrar langabbadøturnar.

Vit vita at Camilla nú er farin í ein betri stað, har eingin pína og eingin sorg er, og tað besta vit sum trúgvandi kunnu gleðast um, er at vit øll skulu síggjast aftur.

Eg ynski við hesum fáu orðum at takka fyri tað tíðina, sum eg fekk at kenna Camillu og fyri tað, sum hon var fyri okkum, og ikki minst tær Dia, fyri tað sum tú ert fyri okkum. Takk fyri alt, má Harrin styrkja teg og tíni, Æra verið minnið um Camillu.

Heilsan frá okkum øllum

Heidi

Viðmerking:

Nøkur orð um bóklingin:

Staðarnøvn í Fuglafjarðar sókn

14.august í fjør stóð sólin still í eitt døgn. Hetta var dagurin, tá ið 150 ára fagnaðarhaldið var á Hellunum. Mikil rómur var henda dag, og varð her so væl borið at, at enn er eftirsjóð frá hesum degi í huganum Ikki bert tí at sólin stóð still, men henda løta var flatin litfagurt endurskin frá farnum døgum í orði og verki, sum tað sømir seg fólki, ið er at sær komið.

Ein bók kom út um Hellunar, og ein bóklingur var eisini rikin í rætt henda fagnaðardag. Tað var Alfred Klein, sum saman við Petur Martini Petersen høvdu greitt ein fittan bókling úr hondum um staðarnøvn í Fuglafjarðar sókn.

Ein bók er ein bók, men bøkur eru ymiskar bæði í dygd og skapi. Tekur tú bók í hondina kann tað kennast á skapinum , at vera leskiligur lesnaður- nøkunlunda, sum tá ið mett verður um seyðavekt á heystardegi. Onkur, sum metti um vektina á einum lambið, plagdi at siga: Hetta er báðu megin tríati pund, tað er lítið upp á fót, men tað fer at hyldnast. Og so var. Skoðsmálið stóð sína roynd., og metingin kom honum, sum hevði dálað um, til góðar. Hann var umtalaður sum ein skilamaður, og fekk litið upp í hendi ikki bert ta einu ferðina at lyfta og lætta, men fekk heitið at vera tann á rættargarði, sum kom við tí bestu metingini, tá ið seyður lá niðurbundin antin hann skuldi skerast ella sleppast.

Alfred Klein sum er rithøvundurin til hesa bók og Petur Martin Petersen, sum hevur savnað og lagt bókina til rættis, hava verið hepnir við hesum bóklingi. Bóklingurin er ikki stórur upp á fót, men holdið er gott, hetta hevur hyldnast sera væl at nøra um tilveruna á ein slíkan hátt, at sigast má, at hetta er eindømi at greiða staðarnøvnini á henda hátt. Ein leskiligur bóklingur at hava í hendi og forvitnisligur at bladа í. Bøkur eru dýrabara, ja, so dýrabarar, tað er tað besta vit eiga.

Til mong staðarnøvn eru eisini frásagnir. Hetta ger at bóklingurin verður meira enn ein bóklingur um staðarnøvn. Vit kunnu leggja afturat, at her er eisini søguligur ráki í bókini. Staðarnøvnini gerast livandi, og tú kennir søgu og stev í nøvnunum, so tað verður borin ein kultiskur andi fram, sum tykist at vera lítisverdur í okkara eygum í dag, men fyri tey farnu ættarliðini, hevði hetta alstóran týdning. Natúran var teimum andsborin, og tað sum livdi í steinum og heyggjum skuldi hava frið. Tíanverri eru vit so háttað í dag, at vit virða ikki natúrina. Hví skulu havnarmenn flyta Glyvursnes til Havnar, hvønn rætt hava teir til tað? Ella hví skal Hæddin oman fyri Lamba týnast? Hví skulu áirnar á vestursíðuni í Funningsfirði turrleggjast? Vit leika í, sum um vit eru síðsta ætt, ið livir á hesum klettum…. og kanska eru vit tað.

Sagt var um ymsar steinar og heyggjar, at har var í-bygt. Eingin mátti nema við tað , har huldufólk, vættrar og álvar hildu til. Tak bara tann heilaga runnin hjá urfólkunum, har andin búði. Hann vakti yvir teimum dag og nátt, og tey høvdu virðing fyri honum. Tey óttaðust andan, ið búði í runninum. Vóru eingi trø, so vóru eingi dýr. Trøini vóru teirra lív og tilvera. Ikki kann tað sigast um okkum, sum kristi fólk at vit fara við natúrini á sama hátt sum uppruna fólk.

Nú er natúran steindeyð í okkara eygum. Herluf, sáli,
plagdi at siga: Nú trúði eingin upp á illamann og huldufólk longur. Svá er. Vit hava ikki fyrilit. Vit himpra okkum ikki við at sorla steinar, klettar, hellur, hamrar og heyggjar og leggja alt undir heilt. Í mongum fórum er hetta lítilátað gjørt og ósømiligt fyri okkum sum mentað tjóð.

Hvussu kunnu vit aftur røkka hagar, at natúran verður eins lívrunnin sum altarvínið? Hevði hesin bóklingur, við hópin av staðarnøvnum og frásagnum gjørt, at vit steðgaðu á eins og á Hellunum 14. august í fjør, tá ið sólin stóð still, vóru vit betur farin, og teir fornishu høvdu sæð til okkum við blíðari eygnabrái. Teir skulu eisini hava frið, men fáa teir tað?

Petur Martin og Alfred eru grannar frá kl 9:00 á morgni til kl. 18:00. Hetta grannalag hevur borið góðan ávøkst. Petur Martin er kunningarstjóriið og bókavørur á Bókasavninum í Fuglafirði, men Petur Martin er eisini formaður í Fuglafjarðar

Fornminnisfelag og er fróðarmaður. Afred hevur verið røktingamaður, sjómaður og landari og hann býr digst við Bókasavnið. Fáur hevur gingið so nógv í høgunum í Fuglafjarðar sókn sum Alfred Klein. Her hevur runnið saman millum teir báðar, og úr hesum spurdist ein bóklingur.

Onkrir smáfeilir eru í bókini. Hetta verður rættað, so næsta útgáva verður lítaleys. Betur hevði verið um kortið við talmerkingunum yvir staðarnøvnini var í fleiri pørtum, so hesi tøl vóru størri; men tað er altíð so, ofta er invingarsamt um peningurin, sum tú hevur til taks til bókaútgávuna, fer at røkka ella ikki. Tað kann hugsast, at soleiðis hevur tað óivað verið her; men snilt er at gera bókina soleiðis, sum her er gjørt. Fotomynd er yvir økið við staðarnøvnum. Góður og greiður tekstur um staðarnøvnini og forvitnisligar frágreiðingar til fleiri staðarnøvn.

Aftast í bókini eru tríggjar síður, sum ein og hvør kann gera sínar viðmerkingar til hetta rit. Hetta má sigast at vera tignarligt. Hvør gevur bókling út og letur aðrar koma uppí? Tað munnu vera fáir, ið eru so demokratiskir.

Sum heild er hetta ein fittur bóklingur, sum tú altíð kanst hava hjá tær, og ikki at tala um, tá ið farið verður niðanfrá, at hava hann við sær so kanst tú læra teg hesi staðarnøvn, tá ið gingið verður hesar leiðir, sum bóklingurin vísir á.

Bókin er ikki bert báðumegin við dygd og góðsku, men er gott avrik. Høast hon ikki er stór upp á fót, hyldnast hon væl. Jú, hetta var snilt funnið uppá og hóskaði hetta væl til dagin á Hellunum í fjør 14. August, tá ið sólin stóð still.

Vónandi verður hetta ikki bert tann eini bóklingurin, ið kemur út í hesum hami, men vónandi koma fleiri. So verða vit tað ríkari.

Frits Johannesen Fuglafjørður

Tilfar til loppumarknað

Nú er høvi at rudda allar goymslur, tí leygardagin 11. mars hevur Skótafylki Sigmunds Brestissonar stórt tiltak á Læraraskúlanum við m.a. loppumarknaði

Í summar fara 40 skótar á legu í Onglandi, og í hesum sambandi hevur Skótafylki Sigmunds Brestissonar stórt tiltak á Læraraskúlanum leygardagin 11. mars til tess at stuðla skótunum fíggjarliga til ferðina.

Fríggjakvøldið og leygardagin í hesi vikuni verður tikið ímóti lutum til loppumarknaðin, og tey, sum hav alutir heima, sum tey vilja lata til endamálið, eru hjartaliga vælkomin við teimum.

Fáa fólk ikki komið sjálv, heinta vit fegin lutirnar heima hjá teimum.

Góð, rein klæðir, serliga barnaklæðir, eru sjálvsøgd, men ikki minst aðrir lutir koma væl við, eitt nú húshaldstól, borð, stólar, sengur, spegl, myndir, rammur, spøl, bandupptakarar, rulluskoytur, skoytur, leikur, plátur, fløgur, bøkur, ja, alt, sum góður dugur er í, og sum stendur og tekur pláss heima við hús, tí eingin nýtir tað longur, kann koma øðrum til góðar, um tað verður latið inn á loppumarknaðin.

Tit kunnu ringja til 313506, 313436, 317618, 319979 ella 311144, so avtalast kann, nær tit koma við lutunum, ella nær teir kunnu verða heintaðir.

Vit hoyra fegin frá tykkum, um vit á henda hátt kunnu gera hvør øðrum ein beina.

Minningarorð um mín elskaða abba
Símin Petur Rasmussen
f. 11. juni 1926 – d. 12. februar 2000

Góði abbi
Nú orkaði tú ikki meira. Eg bleiv ógvuliga kløkk, tá ið tey ringdu úr Haraldsundi, og bóðu mammu koma norð, tí at tú ikki hevði tað so gott, og at tey høvdu ringt eftir sjúkrabilinum. Seinni um kvøldið, fekk tú tað betri og tá ið eg fór av sjúkrahúsinum, vardi tað meg ikki, at eg hevði sæð teg fyri seinastu ferð.

Tú hevði drigist við sjúku í nógv ár, og fleiri ferðir var sent boð eftir sjúkrabili til tín, og tí ivaðist eg ikki í, at tú eisini fór at klára tað hesuferð, men so varð ikki.

Tú var ein sera stuttligur og bráður maður, og tú var altíð í sera góðum lag. Um vit spurdu teg hvussu tú hevði tað, so svaraði tú altíð: »Eg havi tað fínt« sjálvt um vit vistu, at tú ikki hevði tað so gott. Á sjúkrahúsinum, tá ið eg sá teg fyri seinastu ferð, segði tú eisini, at tú hevði tað fínt, og helt at vit gjørdu eitt øgiligt roks burturúr, við at ringja eftir sjúkrabili til tín.

Tú hevur verið ein trúfastur maður, bæði so og so. Í Haraldsundi hevur tú trúliga lisið lestur høvnn sunnudag í yvir 40 ár. Í 1998 fekk t´áu eisini heiðurstekin frá drotningini fyri drúgva tænastu.

Tú kendi nógv fólk, tú var góður við øll og tú tosaði við øll.

Um ung ella gomul fólk komu á gátt, so dugdi tú altíð at fáa eitt prát í lag, tær dámdi væl at práta.

Eg kann minnast sum barn og eisini nú sum vaksin, hvussu stuttligt tað altíð var, at koma norður til Haraldsunds at vitja tykkum, tú dugdi so væl at fáa okkum at flenna, tú var altíð klárur við tí stuttligu, og tær dámdi at hava fólk rundan um teg.

Tað er ein stórur saknur, nú tú ert farin. Tað kennist løgið at koma norð og tú ikki situr har við borðið, eins løgið kennist tað at ringja norð, og at tú ikki tekur telefonina, tí tað var tú vanur at gera.

Eg veit, at hetta er svárt hjá okkum øllum, vit vóru øll so góð við teg.

Mínir tankar fara til systrarnar hjá tær, Ellu, Fridu, Fíu og Poulinu, tit vóru so góðar við abba. Má Harrin styrkja tykkum.

Góða elskaða omma. Hjá tær er saknurin stórur, tú hevur passa abba so væl øll hesi árini. Má Jesus páði hjálpa tær fíggjognum hetta.

Góði Pól, eg veit tað var svárt hjá tær at vera til fiskiskap, og fáa boðini um at abbi var farin. Nú eru tú og omma einsamøll har norðuri, men Harrin fer at styrkja tykkum hjálpa tykkum víðari fram. Nú hevur abbi tað gott, nú er eingin sjúka meir.

Marianna, Gunnvør og Jastrid v/familju. Má Harrin styrkja og hjálpa tykkum fígjognum hesa sváru tíð.

Við hesum fátæku orðum vilja eg, mamma, babba, Hassadi, Símun Petur og Sólbjørn við virðing minnast abba í Haraldsundi.

Friður verið við minninum um abba.

Anni